ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

12. august 2022
Mál: 22/14450-4
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BÁT

Svar upp á § 52 a fyrispurning frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmanni settur Sólvit E. Nolsø landsstýrismanni í almannamálum um bíðilistar til frítíðartilboð

Spurningar:

1. Hvussu nógv børn í skúlaaldri frá 3. flokki standa á bíðilista til frítíðartilboð eftir skúlatíð?
2. Hvussu nógv fleiri børn hava tørv á frítíðartilboði til skúlaárið, ið byrjar nú?
3. Er nøkur ítøkilig ætlan at útvega hesum børnum frítíðartilboð í skúlaárinum, sum byrjar nú?
   Um ja, hvussu er ætlanin at skipa tilboðið, og nær kann væntast, at tilboðið byrjar?

Til nr. 1 og 2
Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum stóðu 34 børn á bíðilista til frítíðartilboð 30. juni 2022.

Av hesum 34 hava fimm børn fingið bjóðað frítíðartilboð at byrja nú eftir summarfrítíðina. Fleiri onnur hava síðani søkt frítíðartilboð, og er bíðilistin nú aftur 34 børn.

Royndirnar vísa, at Almannaverkið eisini fær tvær til tríggjar umsóknir um frítíðartilboð til hendan málbólk eftir skúlabyrjan.

Til nr. 3
Almannaverkið hevur í longri tíð arbeitt við ítøkiligum ætlanum um at útvega børnunum á bíðilista til frítíðartilboð frá 3. flokki hóskandi tilboð. Komið er væl áleiðis við hesum arbeiði. Tó vantar enn nakað í, til bíðilistin heilt verður burtur.

Avtala er nýliga gjørd við Tórshavnar kommunu um leigu av hølum til frítíðartilboð á Frúutrøð í Havn. Tilgongdin at seta leiðara til frítíðartilboðið er byrjað, og tá leiðari er settur, verður søkt eftir starvsfólkum.

Við frítíðartilboðnum á Frúutrøð, umframt annað størri høli í Tórshavn, hevur Almannaverkið, tá heystið kemur, hóskandi frítíðartilboð til øll tey børn í Suðurstreymoy, sum í løtuni hava tørv á frítíðartilboði frá Almannaverkinum komandi skúlaár.

Arbeitt verður somuleiðis við at víðka frítíðartilboðini hjá Almannaverkinum í hinum økjunum í landinum. M.a. verður onkur stovnur uppnormeraður við nøkrum plássum, fáa nýggj og størri høli til vega og harvið fleiri pláss. Harafturat arbeiðir Almannaverkið við at gera seravtalur við tær kommunur, sum hava frítíðartilboð til børn í 3. flokki soleiðis, at tey børn, sum hóast serliga tørvin kunnu megna at ganga í kommunala frítíðartilboðnum við eyka normering, fáa hóskandi tilboð. Almannaverkið hevur í løtuni eina slíka seravtalu.

Við hesum átøkum væntar Almannaverkið, at tá komið er út á heystið, hava áleið 27 av teimum 34 børnunum, sum nú hava tørv á frítíðartilboði eftir summarfrítíðina, fingið bjóðað hóskandi tilboð.

Um sæð verður burtur frá teimum møguligu umsóknunum, ið Almannaverkið vanliga móttekur eftir summarfrítíðina, væntar Almannaverkið, at samlaði bíðilistin til frítíðartilboð frá 3. flokki í heyst verður um 7 børn. Men arbeitt verður eftir, at enn fleiri børn kunnu verða fevnd av átøkunum, og at bíðilistin verður burtur.

Almannamálaráðið, 16. august 2022

Sólvit E. Nolsø,
landsstýrismaður